

*- Sjálvar samráðingarnar gingu væl, men júst ólógligi bandupptakarin lýsir væl illgrunasama hýrin millum Føroyar og Danmark hesi árini. Tað er brot á allar etiskar reglur at taka samráðingar upp á band, tá tað er avtalað frammanundan. Eg minnist, at eg sleit fundin ,og kendi meg noyddan at siga nøkur álvarsorð við Høgna Hoydal undir fýra eygum.*

*- Ætlaðu føroyingar út úr ríkisfelagsskapinum, máttu teir fáa skriftina á veggin: Blokkstuðulin skuldi hvørva eftir fýra árum, og føroyingar skuldu haraftrat missa øll síni rættindi sum danskir ríkisborgarar í Danmark. Hóast hetta óivað var sum at fáa ein frammaná hjá føroyingum, haldi eg framvegis, at okkara mótspæl var skilagott og rætt.*

### Nyrup fær frið

Árið 2005 fer neyvan í søguna sum tað minnisríkasta hjá Frank Jensen. Ævigi krúnprinsurin hjá danska Javnaðarflokkinum mátti lúta fyri modernaðu kvinnuni, Helle Thoring Schmidt, í formansstríðnum, og eftir ósigurin boðaði Frank Jensen frá, at hann fer at taka seg úr politikki til komandi fólkatingsval.

Tað eru nógvar meiningar um, hví Frank Jensen noyddist at lúta fyri politiskt óskrivaða blaðnum, Helle Thorning Schmidt, men lítil ivi er um, at álopið frá Poul Nyrup Rasmussen var við til at geva honum mønustingin. Í sjálvum valstríðnum fór fyrrverandi forsætisráðharrin, sum ikki longur er partur av fólkatingsbólkinum, út í fjølmiðlarnar at siga dønum, at hann hevur ta áskoðan, at Frank Jensen er ikki rætti maðurin at stýra danska Javnaðarflokkinum. Hetta uppáhald byggir hann á árini hjá honum sum ráðharra, har hann fekk ivasamt skoðsmál frá sínum fyrrverandi arbeiðsgevara.

Hóast lítil ivi er um, at Frank Jensen ikki hevur føgur orð at bera Poul Nyrup Rasmussen í dag, er hann trekur at seta spurnartekin við leiklutin hjá Nyrup sum stjórnarleiðara undir ísaköldu viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark í nítiárunum.

- Hóast tú ivaleyst hevur hugsað, at eg fór at leggja eftir Nyrup, eftir at hann framdi karaktermorðið móti mær, so er tað ímóti mínum politisku idealum at gera tað. Tað lættasta hevði verið at givið honum av grovfílini í samband við hansara framferðarhátt í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark, men hesum sýti eg fyri, tí eg haldi, at hann bar seg rætt at. Eg eri fullgreiður yvir, at Nyrup ikki fær bestu skoðsmálini í Føroyum, og hetta haldi eg er órímiligt, sigur hann

Hann leggur afturat, at tað lá Nyrup á hjarta at taka sær av tí føroyska fólkinum, og hann valdi at seta sín persón lægri enn vælferðina hjá føroyingum. Frank Jensen slær fast, at hann heldur, at Nyrup er órímiliga mistonkiliggjørdur.

- Hann vildi fyri alt í verðini ikki verða tann forsætisráðharrin, sum var við til at breiðka gjónna millum rík og fátæk í Føroyum. Nyrup læt seg ikki ávirka av einum fullveldisráki. Hann vildi ikki svíkja tey, sum høvdu verið arbeiðsleys í Føroyum og fingið verri sosial kor, um fullveldisætlanin gjørdist veruleiki. Vit vórðu fullgreiðir yvir, at politikkararnir og tey múgvandi í Tórshavn vóru ikki tey, sum fóru at verða rakt av fullveldisætlanini, men hinvegin fólkið á smærru plássunum. Hesum fólkum kundu vit ikki slept upp á fjall, tí eitt bankamál østi alt upp, fortelur hann.

### Køld móttøka

Frank Jensen var tvær ferðir í Føroyum, tá harðast leikaði á millum Føroyar og Danmark seinast í nítiárunum. Í 1997 var hann sum løgmálaráðharri við at lata nýggju løgreglustøðina í Klaksvík upp, og trý ár seinni, í 2000, samráddist hann við føroyska myndugleikar um yvirtøku av løgregluni. Ferðirnar til Føroya standa enn sterkt í hugaheiminum, men ikki fyri tað positiva.

Í 1997 minnist hann aftur á, at hann varð fullkomiliga tikin á bóli av, hvussu áleypandi føroyskir fjølmiðlar vóru, og serliga legði hann til merkis, hvussu ágangandi Sjónvarp Føroya var.

- Føroyska sjónvarpið hevði fingið frænir av, at ein limur í Grønborg-bólkinum, sum varð settur at kanna partabrævabýtið, hevði eina fortíð í Den Danske Bank, og tískil kundi spurnartekin setast við hansara gegni. Eg var nýliga settur sum løgmálaráðharri, og visti av ongum, tá eg brádliga varð álopin av føroyska sjónvarpinum uttan fyri hotellið, har eg búði. Eg minnist meg verða skelkaðan av ágangandi spurningunum. Eg var jú komin til Føroya at lata eina løgreglustøð upp, og satt at siga varð eg fullkomiliga tikin á bóli av kalda stemninginum í Føroyum um hetta mundið. sigur Frank Jensen.

Trý ár seinni var hann aftur í Føroyum. Hesaferð skuldi hann samráðast við Høgna Hoydal um yvirtøku av løgregluni. Undir sjálvum samráðingunum varnast eitt av donsku embætisfólkunum, at føroyska samráðingarnevndin nýtir ein bandupptakara undir borðinum fyri at fáa samráðingar festar á band, og hetta skapti mikla øsing, tí tað var greitt avtalað frammanundan, at eingin bandupptakari skuldi nýtast.

- Sjálvar samráðingarnar gingu væl, men júst ólógligi bandupptakarin lýsir væl illgrunasama hýrin millum Føroyar og Danmark hesi árini. Tað er brot á allar etiskar reglur at taka samráðingar upp á band, tá tað er avtalað frammanundan. Eg minnist, at eg sleit fundin ,og kendi meg noyddan at siga nøkur álvarsorð við Høgna Hoydal undir fýra eygum. Júst slíkar hendingar vóru við til at gera samráðingar møðsamar, heldur hann.

### Fogh heystar

Uttan mun til politiskan lit er tað neyvan at taka munnin ov fullan at koma til ta niðurstøðu, at friður í stóran mun valdar í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark, um vit sammeta støðuna fyri nøkrum árum síðan. Síðan Anders Fogh Rasmussen gjørdist stjórnarleiðari í Danmark á heysti 2001, hevur hann lagt seg eftir at hava eina konstruktivan dialog við føroyingar, sum hann ofta málber seg.

Spurdur, um Fogh Rasmussen hevur verið dugnaligari enn Nyrup, Lykketoft og hann sjálvur, nú viðurskiftini millum Føroyar og Danmark eru batnað, svarar Frank Jensen:

- Fogh heystar uttan iva tað í dag, sum vit máttu stríðast fyri. Alt stríðið, sum vit máttu fara ígjøgnum, er horvið í dag, og nú kann Fogh bert líta frameftir. Uttan at koma nærri inn á tað, so hevur persónligi stílurin hjá Fogh sammett við Nyrup, møguliga eisini havt týdning fyri góðu viðurskiftini, sum valda millum Føroyar og Danmark í dag, heldur fyrrverandi danski løgmálaráðharrin.

Hann heldur, at tað, sum er sett út í kortið í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark, er uppbyggjandi, og Frank Jensen sigur seg bíða í spenningi eftir, hvussu nýggja uttanríkis- og heimildarlógin fer at rigga.

- Hjá okkum á Christiansborg eru tað ikki longur Føroyar, sum fara við drúgvari tíð, tí viðurskiftini eru komin í fasta legu. Hinvegin er tað Grønland og sjálvstýrisnevndin, sum fer við nógvari tíð, sigur Fran Jensen.

*- Føroyska sjónvarpið hevði fingið frænir av, at ein limur í Grønborg-bólkinum, sum varð settur at kanna partabrævabýtið, hevði eina fortíð í Den Danske Bank, og tískil kundi spurnartekin setast við hansara gegni. Eg var nýliga settur sum løgmálaráðharri, og visti av ongum, tá eg brádliga varð álopin av føroyska sjónvarpinum uttan fyri hotellið, har eg búði. Eg minnist meg verða skelkaðan av ágangandi spurningunum.*